# ÍTRÓTTUR

SAMBAND
JÁKUP MØRK
JAKUP@SOSIALURIN.FO
TLF. 341800

*- Tú kanst siga, at vit raknaðu við, meðan dysturin varð spældur*

*Andreas Herzog, Eysturríki*



# Rógvi helst við til Litava

*Við 10 landsliðsmálum er Rógvi Jacobsen metmaðurin á føroyska landsliðnum. Landsliðsvenjarin vónar, at Rógvi verður partur av hópinum, sum mánadagin fer til Litava*

**Saman við hinum landsliðsspælarunum møtti Rógvi Jacobsen eisini, tá landsliðshópurin savnaðist á miðdegi. Hinvegin er Andreas Lava Olsen úr Víkingi ikki tøkur**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Saman við Andreas Lava Olsen hevur Rógvi Jacobsen staðið á bíðilistanum hjá landsliðsvenjaranum, men tað er lítið sannlíkt, at málsókni klaksvíkingurin verður tøkur til dystin leygardagin.

- Eg havi tosað við bæði Rógva og Klæmint Isaksen, sum er fysioterapeutur hjá okkum. Og tað er sera ivasamt, um Rógvi er førur fyri at spæla leygardagin. Hann spældi fyri fyrstu ferð í fleiri vikur, tá KÍ spældi móti ÍF seinast, men hann er ikki so væl fyri, sum hann vanliga plagar at vera. Skaðin hevur gjørt, at hann als ikki hevur vant í fleiri vikur, men vit ætla so at nýta komandi dagarnar til at fáa eina gjøllari meting av, hvussu hann er fyri.

- Mín vón er so, at vit kunnu hava Rógva við, tá vit fara til Litava mánamorgunin. Avrikini, sum hann longu hevur framt á landsliðnum, tala fyri seg, so eg vóni, at hann er ein av teimum, sum vit kunnu brúka í tí dystinum, sigur Jógvan Martin Olsen, landsliðsvenjari.

Andreas Lava Olsen stóð eisini á sonevnda bíðilistanum, tá landsliðshópurin varð kunngjørdur, men hann verður so ikki tøkur til dystirnar leygar- og mikudagin.

- Eg eri byrjaður at venja aftur, men enn eri ikki til reiðar at spæla dyst. Og so slettis ikki landsdyst, sigur Andreas, ið sum vera man harmast um, at hann ikki kann vera við til júst hendan dystin. Ein dystur, sum í so nógvar mátar er søguligur fyri føroyingar.

# Krútsterk kapping í Klaksvík

*Føroysku telvararnir fáa sítt at siggja til, tá sterkasta talvkappingin í føroyskari søgu fer av bakkastokki leygardagin*



**Leygardagin byrjar Klaksvík International, har ikki færri enn fýra stórmeistarar eru millum luttakararnar**

TALV
*Tíðindaskriv*

Talvsamband Føroya og Klaksvíkar Talvfelag skipa fyri Klaksvík International 2008 í døgunum 11. - 18. oktober 2008.

Talan er um sera forkunnuga kapping. Ikki minst tí, at talan er um sterkastu talvkapping, sum telvað er í Føroyum nakrantíð ! Meðalstyrkin á luttakarunum er 2429.

Heili 4 stórmeistarar og 2 altjóða meistarar, luttaka, saman við føroyingunum Heina Olsen, Martin Poulsen og Olaf Berg. Telvað verða 9 umfør - „allir ímóti øllum".

Serliga spennandi verður, hvørt lokali Heini Olsen megnar at vinna sín triðja og seinasta IM-norm í kappingini - á heimavølli - sum harvið tryggjar honum heitið Altjóða Meistari í Talvi (IM). Evnaríku - ungu havnatelvararnir - Martin Poulsen og Olaf Berg hava somuleiðis møguleikan av álvara at taka av tilboðnum um at byrja IM-leiðina, um úrslitini laga seg eftir vild.

Telvað verður í Klaksvík - fimleikahøllini við musikskúlan. Altjóða dómarin, Arild Rimestad, verður dómari, meðan Finnbjørn Vang, fyriskipari, leiðir kappingina.

## FAKTA

**Telvararnir**

| Telvari | Tjóð | Rating |
|---|---|---|
| GM Sarunas Sulskis | Litava | 2573 |
| GM Gawain Jones | Ongland | 2548 |
| GM Miroslav Grabarczyk | Pólland | 2516 |
| GM Ralf Åkeson | Svøríki | 2484 |
| IM Tapani Sammalvuo | Finnland | 2464 |
| IM Esben Lund | Danmark | 2425 |
| FM Daniel Semcesen | Svøríki | 2402 |
| FM Heini Olsen | Føroyar | 2376 |
| Martin Poulsen | Føroyar | 2281 |
| Olaf Berg | Føroyar | 2227 |